## Nýggjur Vodafone-dómari

Bárður Mortensen dømdi fríggjakvøldið sín fyrsta dyst í fremstu føroysku fótbóltsdeildini. Hetta tá hann leiddi uppgerðnia millum Víking og 07 Vestur. Bárður, sum er 36 ára gamal, hevur áður dømt dystir í næstbestu deildini, og tað kemur hann eisini at gera framyvir. Nú er hann tó eisini partur av toyminum, sum skal døma í Vodafone-deildini, og hann fekk nógvar rósur fyri fyrstu uppgávuna fríggjakvøldið.



## Dalglish skal hjálpa Liverpool

Fyrrverandi stórspælarin og venjarin hjá Liverpool, Kenny Dalglish, skal nú styrkja um ítróttarligu leiðsluna í Liverpool. Dalglish, sum í dag er 58 ára gamal, skal ikki verða partur av venjaratoyminum, men hansara royndir skulu koma Rafael Benitez til góðar, skriva enskir miðlar. Dalglish hevur seks ferðir verið enskur meistari við Liverpool, og tríggjar ferðir hevur hann vunnið Europa-Cup fyri meistarar við felagnum.

## Mugu vera fokuseraðir

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, var sum vera man nøgdur við úrslitið og eisini partvís við avrikið:

- Teir eru væl við fyrstu løtuna, men so skora vit trý mál, og tað er týðuligt, at spælararnir taka frá, tí teir halda, at alt er avgjørt. Vit vórðu kløkkaðir, tá ið teir sleppa framat og skora tvey mál, sum sæð út frá okkara sjónarmiði vóru bílig. Men tíbetur loftaðu vit okkum, og Andreas vísti við tveimum málum, hvør dugur er í honum, og tað var eisini hugaligt, at tveir innskiftarar stóðu fyri síðsta málinum.

*Og nú bíðar HB í Gundadali?*

- Ja, vit skulu spæla tvær ferðir ímóti HB, og tað gleða vit okkum til. Fyrst í landskappingini í Gundadali í vikuskiftinum og síðani í steypakappingini í Gøtu. Í kvøld fara vit til Runavíkar at hyggja at teimum, men longu í stórsteypadystinum ímóti EB/Streymi sást, at HB hevur eitt gott og samanspælt lið.

-jh

## Tað er neyðugt at tetta

Rúni Nolsøe staðfesti, at tað hevði verið munur á, og at tølini vístu, at tað næstu vikurnar verður neyðugt at arbeiða nógv við verjupartinum hjá 07 Vestur:

- At eg var á liðnum kom eitt sindur brádliga á. Eg varð spurdur, um eg vildi hjálpa til, og eg havi vant í tvær vikur. Hvussu tað verður hjá mær, veit eg ikki. Vit taka ein dyst í senn. Hesaferð vísti gongdin, at vit næstan komu afturíaftur, og at vit høvdu nýtt so nógva orku til at fáa um endan, at eingin luft var eftir, tá ið teir beinanvegin eftir annað málið hjá okkum øktu til 4-2.

-jh

Víkingur-07 Vestur 6-2 (3-1):

# Eingin luft eftir í teimum nýggju

**Talan gjørdist um stórsigur í Sarpigerði, tí breidd og tyngd hjá Víkingi og 07 Vestur ikki kunnu sammetast**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*Víkingur*

*07 Vestur*



*Uppflytararnir úr 07 Vesturi hava fingið eina trupla byrjan upp á kappingarárið. Fríggjakvøldið máttu teir fyri triðju ferð av trimum møguligum bíta í graslíkið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

At tað er stórur munur á liðum, sum verða roknað at vera kandidatar til heiðursmerkjapláss, og teimum, sum verða roknað at skula stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, varð undirstrikað í góðveðrinum í Gøtu fríggjakvøldið.

Víkingur vann 6-2 á 07 Vestur. Fyrstu fimm minutt-irnar bjóðaðu gestirnir av, og eina lítla løtu í 2. hálvleiki, tá ið 07 Vestur hevði minkað um munin til 3-2, kendist tað sum um, at heimafólkið var skelkað. Men bara í eina lítla løtu, tí Andreas Lava Olsen setti so at siga einsamallur miðverjuna upp á pláss og skoraði tvey mál, og tá kundi munurin verið uppaftur størri enn 6-2.

Tá ið lítil hálvur tími var farin, var støðan 3-0, og heimaliðið var so mikið nógv omaná, at teir væl kundu havt skorað seks mál, áðrenn Milan Pejcic – einsamallur millum seks mótstøðumenn – megnaði at stýra bóltin í kassan til 3-1.

Tá hevði tað víst seg at vera ov lætt hjá heimamonnunum, sum nú ikki tóktust taka uppgávuna í nóg stórum álvara. Teir vóru altso so at siga sínir egnu mótstøðumenn, og ferðin og intensiteturin vóru soleiðis, at tað passaði gestunum væl.

Rúni Nolsøe – í øktari útgávu síðani hann plagdi at stýra HB – royndi at hjálpa til á 07 Vestur miðvøllinum, og í vinstra verjuborði sást tað væl, at venjingarstøðan ikki var nakað serlig. Sovorðið gongur ikki ímóti teimum, sum í strembanini eftir at vinna heiðursmerkir - og kanska tey fínastu – eru væl trimmaðir og hava fyrireikað seg í eitt hálvt ár.

Leikliga er enn langt á mál hjá Víkingi, sum hevur nokk so fasta uppstilling. Men tað er stór kapping um síðstu plássini. Hesa ferð var Finnur Justinussen, sum stútaði fyrsta málið, einsamallur á toppinum, og hesa ferð hevði Hans Jørgen Djurhuus vunnið kappingina um miðvallarplássið í vinstru. Tað takkaði hann fyri við av brotsteigarmarkinum og við eitt sindur forkølaðum skoti at økja til 2-0.

### Toppurin

Í útgangsstøðuni var Andreas Lava Olsen ytstur á miðvøllinum í høgru. At hann er væl tann skjótasti føroyski álopsspælarin varð fleiri ferðir undirstrikað. Hann tiltuskaði heimaliðnum frísparkið, sum Súni Olsen sendi upp í hornið til 3-0, og tvey tey næstu málini syrgdi hann einsamallur fyri, eftir at hann hevði sneitt framvið fleiri mótstøðumonnum.

Eingin ivi er um, at Andreas Lava Olsen verður ógvuliga hentur í strembanini hjá Víkingi at røkka so høgt, sum tað ber til. Men tað fer at verða veikleiki, um liðið tekur ferðina av spælinum, og – sum teir gjørdu eina løtu fríggjakvøldið – fer at dúva upp á langar sendingar til óføra mannin, sum varð fluttur fram á toppin, tá ið Finnur Justinussen varð skiftur út.

Útskiftingarnar vóru undirstriking av, hvussu nógv størri breiddin og tyngdin hjá Víkingi er enn hjá 07 Vestur. Teir, sum loystu av á heimaliðnum, vóru allir trimmaðir, og tveir teirra vóru meistarar fyri síðsta málinum: Magnus Skoralíð spældi út frá úr vinstru, og Áslakur R. Petersen sendi bóltin inn um Trygva Askham.

### Ov lættir

07 Vestur hevur tveir teir seinastu dystirnar latið tíggju mál fara ígjøgnum. Tað boðar frá, at verjupartur-in ikki er nóg tættur, og tað boðar eisini frá, at tað á liðnum ikki eru so nógvir, sum hava royndirnar og tyngdina frá bestu deildini.

Milan Pejcic á sentrala miðvøllinum og serliga Tór-Ingar Akselsen, sum fyrst var í høgru og seinni í vinstru, eru stuðlarnir, og tað vóru teir báðir, sum skoraðu málini. Annars eru ov nógvir ov lítið royndir, og ov nógvir vístu seg síðstu løtuna ikki at hava orkuna, sum skuldi til, og tað kostaði.